# Jamie Oliver øsir bretar

Heimsins kendasti sjónvarpskokkur bretin Jamie Oliver, hevur skapt mikla øsing í Bretlandi, tí hann í nýggju sendingini hjá sær, flettir ein seyð. Jamie Oliver svavar seyðin í sendingini, og hetta vilja bretsku hyggjararnir ikki finna seg í, og sjónvarpsrásin Channel 4 er niðurringd av illum hyggjarum, skrivar TV2.dk.

Jamie Oliver tekur ikki øsingina so tungt og sigur, at ein kokkur, ið hevur matgjørt yvir 2000 seyðir, eigur at hava dripið í minsta lagi eitt djór.

Jamie Oliver fletti seyðin í nýggju sendingini hjá sær, har hann ferðast kring Italia við sínum kampingbili, og roynir at endurfinna tokkan til matgerð.

**nud**



# Wenche Hartmann til Føroya

**Tann 18. og 19. nov. verður danska countrysangarinnan Wenche Hartmann í Føroyum. Hon og manning hennara spæla til dans í Havn og í Vági**

**TÓNLEIKUR**
*dagfinn@sosialurin.fo*

Dansur verður í høllini á Hálsi í Havn og í VB høllini í Vági við Wenche Hartmann vikuskiftið 18. og 19. november.

Tað er kappróðrarfelagið í Sumba, ið hevur fingið hana til Føroya. Sumbingar eru í gongd við at fáa neyst í Lopra til kappróður. Talan er um at keypa bátar. Neystagrundin er stoypt og tað er kommunan, ið hevur staðið fyri hesum. Men so skal arbeiðið gerast liðugt og tað er hetta, ið tiltøkini við Wenche Hartmann skulu hjálpa við peningaliga.

Neystið er stórt, eini 100 fermetrar, og ætlanin er at hava alla útgerð, so sum rógvitól og annað.

Wenche Hartmann er countrysongkvinna, ið veruliga hevur undanvind í Danmark og 18. og 19. sleppa føroyingar at dansa til countrytónleik, so sum hann eigur at ljóða.

## Eitt einstakt barnaverndarøki

**Sundalagið:** Nógvar kommunur og oyggjar hava í seinastuni skipað seg í serstøk barnaverndarøki. Nú hevur so Sunda kommuna eisini tikið eina avgerð í hesum máli.

Á seinasta bygdaráðsfundinum samtykti bygdaráðið eitt tilmæli frá trivnaðarnevndini í kommununi. Trivnaðarnevndin mælti her til at øll kommunan verður skipað sum eitt einstakt barnaverndarøki.

Skipast skal soleiðis fyri at fyrisitingin av hesum økinum verður í Sunda kommunu. Ætlanin er somuleiðis at seta eitt fakfólk í starv.

Sagt verður, at um aðrar kommunur ynskja at samstarva við barnaverndarstovuna í kommununi, so kunnu samráðingar takast upp um tað.

**sb.**

## Føroysk vitjan til missiónsviku

**Klaksvík:** Í mong ár hevur KFUM&K havt sonevndar missiónsvikur um heystið, har møtir verða hildin hvørt kvøld í eina viku. Soleiðis verður eisini í ár.

Missiónsvikan byrjar í kvøld og annaðkvøld við bønarmøti, meðan møtini sjálvi byrja mikukvøldið og vara fram til sunnudagin.

Til hesi møtini hevur leiðslan í KFUM & K fingið klaksvíkingin Hera Elttør at tala. Hann virkar sum trúboðari í Danmark, og kemur hann at tala á møtunum um vikuskiftið.

Annars tala Ingolf Johannesen og Alfred Olsen, umframt at nógvur sangur er á skránni.

**sb.**




NORDISK SAMARBEJDE

SPRÅKET

Í samband við Norðurlendsku Ráðstevnuna SPRÅKET, sum var í Føroyum 29. og 30. august 2005, vilja vit hervið hjartaliga takka teimum, sum gjørdu tað møguligt at hava hesa ráðstevnu í Føroyum, - uttan teirra fíggjarligu hjálp, hevði tað verið ómøguligt at gjøgnumført ráðstevnuna.

**Høvuðsstuðlar:**
**Nordisk Kulturfond og Mentamálaráðið**

**Aðrir stuðlar:**
Statoil Føroyar · BP · Christian í Grótinum · LÍV · Føroya Banki
Tórshavnar Kommuna · Jólamerkjagrunnurin · Norðoya Sparikassi
Føroya Sparikassi ·Tryggingarfelagið Føroyar · Farodane
Klaksvíkar Kommuna · Formula.fo · Statoil · Føroya Shell · Reproz · Norðlýsið
Estra · Atlantic Airways · Hotel Føroyar · AP-Bussar

**Ein serstøk tøkk til:**
Jógvan við Keldu, landstýrismann fyri at fáa ráðstevnuna til Føroyar
Jóannes Eidesgaard, løgmann fyri at seta ráðstevnuna,
Jógvan á Lakjuni, landsstýrismann og Heidi Petersen, løgtingskvinnu fyri at luttaka í panelinum.

norden
Nordisk Kulturfond